# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 29.10.2018 |
| Mál nr.: | 0617-005/17 |
| Málsviðgjørt: | NF |

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| **Løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin)** | **Uppskot til**<br><br>**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin)**<br>(Bráðfengis frástøðuboð sett inn og orðið “tilhald” broytt til “frástøðuboð”) |
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 25 frá 27. mars 2017 um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin), verða gjørdar hesar broytingar: |
| **Løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing** | **1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:<br>“**Løgtingslóg um frástøðuboð, uppihaldsforboð og burturvísing**”. |

| | |
|---|---|
| **(Tilhaldslógin)** | **2.** Stytta heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:<br>“**(Frástøðuboðslógin)**” |
| **Kapittul 1**<br>**Tilhald og uppihaldsforboð** | **3.** Heitið á kapitli 1 verður orðað soleiðis:<br>“**Frástøðuboð og uppihaldsforboð**” |
| **§ 1.** Við tilhaldi kann ein persónur fáa forboð fyri at leita upp ein annan persón fysiskt, munnliga ella skrivliga, her uppi í gjøgnum elektroniskt samskifti, ella á annan hátt at seta seg í samband við ella at elta viðkomandi. | **4.** Í § 1 verður “tilhaldi” broytt til: “frástøðuboði”. |
| | **5.** Í § 2, stk. 1 og 2, §§ 5, 6, 12 og 13 verður “Tilhald” broytt til: “Frástøðuboð”, og í § 2, stk. 3, 2. pkt., tríggjar staðnir í § 4, § 14, tríggjar staðnir í § 15, § 16, 1. pkt. og § 21, stk. 1 verður “tilhald” broytt til: “frástøðuboð”. |
| [**§ 2.** (*stk. 1).* Tilhald kann verða álagt, um<br>1) grundaður illgruni er um, at ein persónur<br>a) hevur volt øðrum persóni ónáðir við at forfylgja ella órógva hann, soleiðis sum nevnt er í § 1, ella<br>b) hann ímóti hesum persóni hevur gjørt annað revsivert, sum kann javnmetast við ónáðir, og<br>2) ávísar orsøkir eru at halda, at hann framhaldandi fer at volda hinum ónáðir, soleiðis sum nevnt er í nr. 1.]<br>*Stk. 2 og 3.* --- | **6.** Aftan á § 2 verður sett:<br>“**§ 2 a.** Frástøðuboð kann verða álagt fyribils, um<br>1) ein persónur við rímiligari grund er undir illgruna fyri at volda einum øðrum ónáðir, soleiðis sum nevnt í § 2, stk. 1, nr. 1,<br>2) treytin í § 2, stk. 1, nr. 2 er lokin og<br>3) persónurin ikki hevur ein rímiligan áhuga í at seta seg í samband við hin persónin.<br>*Stk. 2.* Frástøðuboð eftir stk. 1 er galdandi fyribils og fellur burtur, tá avgerð er tikin eftir §§ 2 ella 4, ella tað verður afturkallað.<br>*Stk. 3.* Avgerð eftir §§ 2 ella 4 skal um til ber verða tikin í seinasta lagi 60 dagar aftan á kunngerð av avgerðini eftir stk. 1. |

| | |
|---|---|
| **§ 5.** Tilhald verður álagt í ásetta tíð í eitt tíðarbil á upp til 5 ár. Uppihaldsforboð verður álagt í ásetta tíð í eitt tíðarbil á upp til 1 ár. | **7.** Í § 5 verður aftan á “upp til 5 ár” sett: “, sbr. tó § 2 a, stk. 2”. |
| **§ 6.** Tilhald ella uppihaldsforboð, sum er álagt einum ágangandi persóni, kann verða víðkað til eisini at fata um húsfólk hjá tí órættaða, um tað verður mett at vera neyðugt fyri at røkka endamálinum við tilhaldinum ella uppihaldsforboðnum. | **8.** Í § 6 verður “tilhaldinum” broytt til: “frástøðuboðinum”. |
| **§ 16.** Avgerðir um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing skulu kunngerast. Við kunngerð av uppihaldsforboði og burturvísing skal viðkomandi hava vegleiðing um møguleikan at krevja avgerðina lagda fyri rættin. | **9.** Í § 16 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: “Avgerð um frástøðuboð skal ikki kunngerast aftur, um frástøðuboð eftir § 2 a er kunngjørt og sum viðvíkur sama slag av forboði fyri sambandi o.a.”. |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. |